


teen-o

juul-o

Vetratoy
frá
F.a. Bjalla
J. Paturssonargøta 30
Tlf. 14360

Vælkomin í nýggja FK HANDILIN í Hoyvík —

tann størsta av sínum slagi í Føroyum!



Opið verður soleiðis:

Handilin:

Mánadag — hósdag	kl.	9.00	— 17.30
Fríggjadag	«	9.00	— 19.00
Leygardag	«	8.00	— 14.00

Kafeterian:

Mánadag — hósdag	kl.	10.00	— 17.00
Fríggjadag	«	10.00	— 18.30
Leygardag	«	8.30	— 13.00

Í tíðarskeiðinum frá **mánadegi 11. september til og við mikudegnum 20. september,** letur handilin í Dr. Jakobsensgøtu aftur. Hetta kemst av, at handilin skal málast, vøruuppsetingin broytast og vøruúrvali broytast til dagligvørur við feskum døgurðamati.

Handilin letur so uppaftur **hósdagin 21. september kl. 9.00.**

Meðan handilin í Dr. Jakobsensgøtu er afturlatin, vil FK royna at fáa í lag eina rutu til handilin í Hoyvík, og skal henda rutan koyra til ávísar tíðir frá Dr. Jakobsensgøtu. Tíðirnar koma at verða lýstar seinni og koma at verða uppslignar í vindeyganum í handlinum.

Meðan afturlatið er í Dr. Jakobsensgøtu, verður tíverri ógjørligt at koyra vørur út til limirnar.

Frá og við 7. september vilja bygdaordrar verða avgreiddir frá FK í Hoyvík, og er telefonin nr. 1-2968.

Vit vóna, at limirnir skilja tað neyðuga í hesi broytingini í nevnda tíðarskeiði og vilja bera yvir við, um okkurt skuldi komið skeivt fyri.


Tá alt er komið aftur í rætt lag, eru vit fullvísir í, at møguligt er at veita so góða tænastu, sum yvirhøvur er gjørligt innan fyri handil í dag.

ALLIR LIMIR uttan mun til um teir eru limir í deildunum í Vágoy, Suðuroy, Tórshavn, Fuglafirði ella Klaksvík hava rætt at handla í hesum handli. Limatekning annars kann fara fram í sølubúðini beint innanfyri inngongdina.

Fyri afturberingina (dividenduna) er tað tað sama, um keypt er í Dr. Jacobsensgøtu ella í Hoyvík, tað er sama deild.

Koyrt verður til FK Hoyvík eftir Hvítanesvegnum. Snarað verður til vinstru á Hvítaneshálsi, og týðulig skelti longur frammi vísa vegin inn til FK og tey 120 parkeringsplássini.

Leiðslan



KOYRING TIL FK HOYVÍK